Daewoo Marathon Cup 2002:

Annað umfar verður leygardagin í Klaksvík

Annað av fýra umførum í stóru marathon-kappingini verður í Klaksvík leygardagi

RENNING
Tíðindaskriv

Leygardagin 14. september skipar Ítróttafelagið Treysti fyri øðrum umfari av Daewoo Marathon Cup 2002 í Klaksvík. Kappast verður á ymsum teinum hjá børnum og vaksnum. Seinasta ár vóru einir 60 rennarar við í kappingini í Klaksvík. Teinurin hjá teimum vaksnu hesaferð verður 5 km, á einum strekki sum skal rennast fýra ferðir. Kappingin byrja og endar heilt har úti á Stoksoyravegnum. Runnið verður frá endanum av Stoksoyravegi niðan á Bumshamarsveg og heimeftir til Kelduskákið, har verður snara til vinstru omanaftur á Stoksoyravegin.

Eisini verður barnarenning á Bumshamri leygardagin. Børnini verða býtt í fýra aldursbólkar:

Hjá monnunum er Jonhard Larsen úr Treystinum á odda í samlaðu mara thon-kappingini

Dreingir-7/Gentur-7 (f.1995 ella seinni) renna 700 m.
Dreingir-10/Gentur-10 (f.1992-1994) renna 700 m.
Dreingir-13/Gentur-13 (f.1989-1991) renna 870 m.
Dreingir-17/Gentur-17 (f.1985-1988) renna 870m.
Tilmelding fyri allar aldursbólkarnar verður klokkan 11.30 í PitStop.

Kappingin í Klaksvík er samstundis annað umfar av Daewoo Marathon Cup 2002. Tvey tey seinastu umførini verða runnin 12. og 26 oktober, og verður tað ávíkavíst á Toftum og á Kambsdali.

Tað eru Treysti, Bragdið og Roysnið saman við P/F Esmar Simonsen á Kambsdali, sum skipa fyri kappingini.

Daewoo Marathon Cup er samansett av fýra rennikappingum, ið tilsamans verða 42.195 metrar ella tað sama sum eitt heilt marathon til longdar. Vinnari av Daewoo Marathon Cup verður tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin uppá 42.195 metrar. Kappingin er skipað fyri bæði kvinnur og menn. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3. Samlaði vinnarin av kappingini fær kr. 500, meðan nr. 2, 3, 4 og 5 fáa ávikavist kr. 400, 300, 200 og 100. Eisini verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3. Sum nakað nýtt er eisini ein bólkur fyri veteranar í ár, tvs. fyri tey, sum eru fødd í 1956 ella fyrr.

Støðan eftir fyrsta umfar, sum var 31. august, er tann, at hjá monnunum er Jonhard Larsen úr Treystinum fremstur, meðan Sigurð Justinussen úr Bragdinum er nummar tvey og Snorri Patursson úr Havn er nummar trý. Ialt 22 menn eru framvegis við í kappingini. Hjá kvinnunum er Rigmor N. Arge úr Bragdinum nummar eitt, meðan Ingrid Patursson úr Havn er nummar tvey. Hjá veteranunum er Óli Olsen fremstur, meðan Steintór Hjaltalin og Ólavur H. Olsen eru ávikavist nummar tvey og trý. Teir eru allir úr Bragdinum.

Eisini Mini Marathon Cup fyri børn

Barnakappingin leygardagin er eisini annað umfar av Daewoo Mini Marathon Cup fyri børn. Hjá børnunum verður kappast í fýra aldursbólkum (sí omanfyri). Daewoo Mini Marathon Cup er eisini samansett av fýra rennikappingum, men verða hesar tilsamans 4.219 metrar (ella 1/10 marathon) til longdar hjá dreingjum og gentum -13 og -17. Hjá dreingjum og gentum -7 og -10 verður samlaði teinurin 2.109 metrar (ella 1/20 marathon). Vinnari av Daewoo Mini Marathon Cup verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3. Eisini hjá børnunum verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3 samanlagt, tvs. bert børn, sum hava gjøgnumført øll fýra umførini, telja við í samlaða úrslitinum av Daewoo Mini Marathon Cup.

KÍ vann uttan dyst

Ætlaði veitslufótbólturin, nú føroyameistarnir skuldu vísa seg fyri heimaáskoðarunum varð av ongum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tríggir dystir í bestu kvinnudeildini skuldu eftir ætlan spælast sunnudagin og mánakvøldið, men talan gjørdist so bara um tveir dystir.

KÍ varð fyri vikuni síðani kosin sum meistari triðja árið á rað, og sunnudagin skuldu tær so fyri fyrstu ferð síðani hetta spæla á heimavølli, tá Skála skuldi koma á vitjan. Ætlaða gullveitslan varð tó av ongum, so klaksvíkingar mugu bara brynja seg við tolið, um tey ætla sær at síggja trífaldu føroyameistararnar spæla dyst.

B68 vann bronsudystin

Á Toftum spldu B68 og HB, og í nógvar mátar liktist hetta einum slagi av bronsudysti, tó at alt enn kann henda í hesum spurninginum.

VB68 vann dystin við einum máli móti ongum, og sum skilst, so mundi hetta vera á eini góðari leið. Talan var annars um ein dyst, har stórur partur av spælinum gekk fyri seg á miðjum vølli, og tískil vóru málmøguleikarnir ikki so nógvir í tali. Einasta málið í dystinum kom tíðliga í dystinum, tá Mary-Ann Isaksen lat eitt hart skot av móti málinun. HB-málverjin hevði hondina á bóltinum, men fekk tó ikki forðað fyri skotinum.

Er stórur spenningur um bronsuna, so tykist silvurplássið mest sum avgjørt. Gaman í hevur B36 spælt ein dyst fleiri enn B68, men eftirverandi dystarskráin sær tó nakað lættari út hjá havnarliðnum. Ikki minst tí KÍ enn hevur dyst móti KÍ eftir.

Mánakvøldið spældi B36 á heimavølli móti GÍ, og tó at tað leingi stóð á gomlum nøglum, so endaði alt við tryggum heimasigri. B36 hevði yvirvágina størsta partin av dystinum, men í fyrra hálvleiki spurdust tó einki burtur úr hesum, og liðini bæði fóru tí málleys til hálvleiks. Í seinna hálvleiki bragdaði tó. Laila Enghamar sendi tvær ferðir bóltin í netið, áðrenn Súsanna Hansen stutt fyri leiklok kundi staðfesta sigurin, soleiðis at silvurmerkini framvegis bleiktra bjart hjá árstalsfelagnum úr Havn.

Úrslit:
KÍ-Skála
KÍ vann uttan dyst

B68-HB 1-0 (1-0)
1-0: Mary-Ann Isaksen

B36-GÍ 3-0 (0-0)
1-0: Laila Enghamar
2-0: Laila Enghamar
3-0: Súsanna Hansen

Støðan, 1. deild kvinnur

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	KÍ	8	8	-	0	-	0	38	6	32	27
2	B36	8	5	-	0	-	3	18	14	4	17
3	B68	7	4	-	0	-	3	13	13	0	13
4	HB	7	2	-	1	-	4	14	13	1	7
5	GÍ	7	2	-	0	-	5	7	25	-18	6
6	Skála	7	0	-	1	-	6	9	28	-19	1

Máltindurin

Rannvá Andreasen	KÍ	15
Malena Josephsen	KÍ	9
Arnbjørg Danielsen	B36	5
Elsa Maria Simonsen	KÍ	5
Vivian Bjartalíð	Kí	5
Heidi Heinesen	GÍ	4
Eyðfríð Kristiansen	HB	4
Anja Weihe	B36	3
Ása á Neystabø	B36	3
Laila Enghamar	B36	3
Hansy Davidsen	B68	3
Majbritt Olsen	B68	3
Elin Jacobsen	Skála	3
Mara Vang	B36	2
Súsanna Hansen	B36	2
Mary-Ann Isaksen	B68	2
Eyðvør úr Dímun	HB	2
Malan á Dunga	HB	2
Vivian Unadóttir	HB	2
Jensa Sirdal	Kí	2
Anna Berg Danielsen	Skála	2

Tórshavnar Súkklufelag riggar av fyri í ár

Súkkluárið er nú at vera liðugt, og komandi vikuskiftið verða seinastu kappingarnar avgreiddar

SÚKKLING
Tíðindaskriv

So er kappingarárið hjá TSF farið at halla, og eru bara tríggjar súkklukappingar eftir, og eru tað sjálvar FM-kappingarnar, sum nú eru á skránni.

Felagið hevur í ár skipað fyri 10 kappingum av ymiskum slagi, umframt barnasúkklukappingum á summarstevnunum, og eru FM kappingarnar byrjanin til fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar á Guernsey 2003.

Sum nakað nýtt, skipar TSF í ár fyri FM í barnabýarsúkkling, og verður hon beint aftaná kappingina hjá teimum vaksnu tórskvøldið.

Kappingarnar verða 12. 13. og 14. september!

Hósdagin 12. september:
FM í Býarkoyring (45 min. + 1 umfar)
Teinur: Koyrt verður sama tein sum á Ólavsøku, tvs. á økinum á Hálsi.
Startur og mál: Føroya Tele.
Kappingin hjá teimum vaksnu byrjar kl. 18.00. Børnini byrja kl 19.00.

Fríggjadagin 13. september:
FM 30 km tíðarsúkkling
Teinur: Plantusølan - Kaldbak - Plantusølan.
Kappingin byrjar kl. 18.00

Leygardagin 14. september:
FM 100 km samlaður startur
Teinur: Toftakei, Eiðisskarð, Rundkoyringin við Streymin, Oyggjarvegur, Ringvegurin, niðan eftir Sundsvegnum, Vegurin Langi og Hvítanesvegur.
Teinurin í Havn skal koyrast 2 ferð!
Kappingin byrjar kl. 10.00.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Skrivstovufólk

Søkt verður eftir tveimum skrivstovufólkum at starvast ¾ tíð á sløkkiliðsstøðini.

Vit bjóða
eitt fjølbroytt og spennandi starv, har uppgávurnar m.a. eru at hava støðvakt, at vera skrivari hjá leiðsluni, roknskaparførsla og aðrar skrivstovuuppgávur.

Vit ynskja
- at tú hevur skrivstovuútbúgving og hollar royndir innan skrivastovuarbeiðið
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og viðskiftafólk
- at tú hevur kunnleika til KT

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, tlf. 314881 ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

Umsókn
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. september 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Verkførari

Søkt verður eftir verkførara til sløkkiliðsstøðina. Verkstaðið á sløkkiliðsstøðini umvælir og og viðlíkaheldur akfør, amboð og onnur tól hjá Tórshavnar kommunu.

Vit bjóða
eitt fjølbroytt og spennandi starv, har uppgávurnar m.a. eru:
- at leiða og skipa arbeiðið á verkstaðnum
- vanligt verkstaðsarbeiði
- goymsluhald og innkeyp av eykalutum

Vit ynskja
at tú
- ert bil- ella lastbil mekanikari, maskinsmiður ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur koyrikort til akfør yvir 3.500 kg
- at tú hevur fyrstuhjálparprógv
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og viðskiftafólk
- hevur kunnleika til KT, tekstviðgerð og rokniark á grundstøði
- hevur royndir innan maskinteknikk og at leiða og skipa arbeiði

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, tlf. 314881 ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

Umsókn
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. september 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Varasløkkiliðsstjóri

Til brandstøðina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir varasløkkiliðsstjóra.

Starvið/ábyrgd
Varasløkkiliðsstjórin hevur tilvísing til sløkkiliðsstjóran og hevur ábyrgdina av Sløkkistøðini, tá stjórin er burturstaddur.

Høvuðsuppgávur
Uppgávurnar hjá varasløkkiliðsstjóranum eru sera fjølbroyttar. Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:
- at luttaka í byggisaksviðgerð
- at luttaka í innsatsleiðaravaktum
- eftirlit við sløkkiliðsútgerð á støðini
- umsitingarskipan fyri:
  - brandpostar
  - skorsteinar
  - vaktarskipanir
- umsiting av vaktsentrali
- venjingar við sløkkiliðsmanningini
- útbúgving av sløkkiliðsmanningini
- skeið fyri stovnum

Førleikakrøv
Neyðugt er at tú:
- kanst vera á støðini innan 5 minuttir frá fráboðan
- hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg
- hevur viðkað fyrstuhjálparprógv
- hevur prógv frá Statens Brandskole sum innsatsleiðari og byggisaksviðgerði við nøktandi ársliti
- hevur heilsuváttan fyri sløkkiliðsfólk
- hevur nøktandi revsiváttan
- hevur áræði, er arbeiðssamur, opin og hevur góð samstarvsevnir

Til ber at útvega sær umrøddu prógv í fyribilsstarvi, ið hægst er 1 ár, tá støða til endaliga setan verður tikin.

Innan KT
Tú skalt hava kunnleika til tekstviðgerð og rokniark á grundstøði.

Setanarviðurskifti
Starvið verður at seta skjótast til ber. Starvið er starvsmannastarv og lønt sambært sáttmálanum við Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, á tlf. 314881 ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, á tlf. 315160.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2002.

SNARSKIVAN

Søkt verður eftir fólki til skaða- og tryggingardeildina

Starvið er í høvuðsheitinum at sýna skaðar á akfør og farm.
Eisini skal viðkomandi gera upp og hava eftirlit við møguligum umvælingum av skaðum.

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at sýna og umvæla skaðar, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum.
Alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

SMYRIL LINE
att.: stjórnin
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

LBF søkir verkfrøðing og teknikara

Vit søkja ein dugnaligan verkfrøðing til okkara nógvu fjølbroyttu og spennandi projekteringsog eftirlitsuppgávur innan byggi- og anleggsfakini.

Eisini søkja vit ein dugnaligan byggifrøðing ella tekniskan teknara til teknideild okkara.

Arbeiðið umfatar fjølbroytt tekniarbeiði við framkomnari cad-útgerð. Luttøka í øðrum tekniskum arbeiði, kann eisini koma upp á tal, í mun til tann førleika sum umsøkjarin hevur.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Hanus Hansen á telefon 314744.

Landsbyggifelagið P/F, Ráðgevandi Verkfrøðingar
Grønlandsvegur 5 · Postboks 228
110 Tórshavn
E-mail: lbf@lbf.fo

Tilboð ynskist

uppá at stoypa nýggja rætt fyri Ytra part í Skálafjalli. Tilfar fæst við at venda sær til Jóan Petur Hansen, 44 15 75, best eftir kl. 17.00. Tilboðini skulu sendast til, Hagastýrið fyri Ytra part í Skálafjalli v/ Jóan Petur Hansen, 485 Skálafjørður.

Hagastýrið

Sosialurin Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir